## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, seinnapartin minni vindur av vestri. Ælingur, partvís vátakavi,. men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið veksur hann vindin upp í skrið ella storm av suðri og regn ella kavi. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hvassur vindur ella skrið av vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís kavi. Hitin milum 1 og 4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin minkar hann vindin til andøvsgul av vestri, men sunnudagin veksur hann vindin aftur upp í hvassan vind av suðri. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 2 og 6 stig.

# Nógvar sparingar við nýggjari hjábreyt

**Hugskotið um eina flogbreyt gjøgnum Klovan tykist hava stóran áhuga, helst tí at nógvar sparingar eru við at brúka felags terminal og aðrar fasilitetir saman við verandi vølli.**

FLOGVØLLUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Vágar:** Í næstseinastu viku kom fram uppskotið hjá Sørvágs kommunu um at gera nýggja hjábreyt til flogvøllin norð gjøgnum Klovan í nánd av verandi flogvølli í Vágum.

Borgarstjórin í Sørvági, Jákup Suni Lauritsen hevur síðani uppskotið kom fram fyri almenningin í farnu viku, kunnað nevndina í P/F Vága Floghavn um uppskotið. Nevndin er á einum máli um, at uppskotið er sera áhugavert og letur upp fyri fleiri spennandi møguleikum rakstrarliga, og tá talan er um logistik.

Sørvágs kommuna hevur givið P/F Vága Floghavn tilsøgn um eina positiva viðgerð av útbygging av flogvøllinum í Vágum. Kommunan, er umframt at vera uppskotsstillari til nýggja flogvøllin í Klovanum, eisini byggimyndugleiki á økinum. Partarnir eru samdir um at hava tætt samskifti um málið.

Sagt verður, at P/F Vága Floghavn hevur enn ikki fingið tær heimildir frá Løgtinginum, sum eru neyðugar, fyri at fara til verka í Vágum.

- Vit vóna og vænta, at eitt av fyrstu málunum sum nýggja løgtingið avgreiðir, tá tað fer til arbeiðis, er at geva nevndini í P/F Vága Floghavn neyðuga myndugleikan at fara til verka, so útbyggingin av Vága Floghavn kann fremjast, sigur Jákup Suni Lauritsen.

Sørvágs kommuna er eisini í samband við Landsverk. Partarnir fara í næstum at tosa saman um uppskotið.




*Tekningin vísir staðið, har nýggja hjábreytin kemur at liggja, í nánd av verandi flogvølli í Vágum*
*Mynd: sorvag.fo*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -11 |
| Ammassalik | -16 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 7 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | -3 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | -2 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 14 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | -4 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt stormlágtrýst, 948 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani fer eystureftir og fer um Føroyar seinnapartin í dag – týsdag.




**Í dag:**
Lágtrýstið eystan fyri Ísland fer í landnyrðing. Lágtrýstið yvir Skotlandi fer í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/01 kl. $06^{00}$ – 17/01. $06^{00}$. Hitin í gjár: 2,1°
Minsti hiti máldur í januar: ° - Mesti hiti máldur í januar: °

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 15/01 kl. $06^{00}$ – 16/01. $06^{00}$
Avfallið higartil í januar: 51 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

15. jan Fyrra kvarter
19. jan Mánin næstur jørðini
22. jan. Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2007

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 22. jan. | 06.16 | 18.44 | 05.16 | 17.44 | 05.31 | 17.59 | 08.16 | 20.44 | 09.16 | 21.44 | 04.31 | 16.59 | 03.31 | 15.59 | 06.31 | 18.59 | 07.31 | 19.59 | 06.01 | 18.29 | 07.16 | 19.44 |
| 23. jan. | 07.12 | 19.37 | 06.12 | 18.37 | 06.27 | 18.52 | 09.12 | 21.37 | 10.12 | 22.37 | 05.27 | 17.52 | 04.27 | 16.52 | 07.27 | 19.52 | 08.27 | 20.52 | 06.57 | 19.22 | 08.12 | 20.37 |
| 24. jan. | 08.03 | 20.25 | 07.03 | 19.25 | 07.18 | 19.40 | 10.03 | 22.25 | 11.03 | 23.25 | 06.18 | 18.40 | 05.18 | 17.40 | 08.18 | 20.40 | 09.18 | 21.40 | 07.48 | 20.10 | 09.03 | 21.25 |
| 25. jan. | 08.48 | 21.09 | 07.48 | 20.09 | 08.03 | 20.24 | 10.48 | 23.09 | 11.48 | - | 07.03 | 19.24 | 06.03 | 18.24 | 09.03 | 21.24 | 10.03 | 22.24 | 08.33 | 20.54 | 09.48 | 22.09 |
| 26. jan. | 09.30 | 21.50 | 08.30 | 20.50 | 08.45 | 21.05 | 11.30 | 23.50 | 00.09 | 12.30 | 07.45 | 20.05 | 06.45 | 19.05 | 09.45 | 22.05 | 10.45 | 23.05 | 09.15 | 21.35 | 10.30 | 22.50 |

